

www.oljan.fo

**Jan Müller** 02 - 11 - 2011

# Oljurisin Schiehallion við markið reisir seg aftur

Størsta framleiðandi oljukeldan í Bretlandi, oljurisin Schiehallion, sum hevur ligið í dvala í eitt hálvt ár, er nú raknaður við aftur. Framleiðslan byrjaði aftur mikudag og kemur hetta sera væl við í Hetlandi. Oljan frá Schiehallion fevnir um 40% av allari oljuni, sum kemur til oljuterminalin Sullom Voe í Hetlandi. Framleiðsluskipið á Schiehallion leiðini er umvælt og kann virka í nøkur ár aftrat, til eitt spildurnýtt framleiðsluskip (FPSO) avloysir tað í 2015-16. Schiehallion oljukeldan liggur skamt frá føroyska markinum og hevur føroyska telefyritøkan Føroya Tele eisini sín part í arbeiðinum á hesi flótandi framleiðslueindini. Shefakaðalin er bundin í Schiehallion kelduna. Hetta merkir, at BP, sum er fyristøðufelag sparir nógvar pengar, tí skjóta telesambandið umvegis Shefa ger uppgávurnar nógv skjótari og lættari. Føroya Tele arbeiðir í løtuni við at menna møguleikarnar vestan fyri Hetland, sum Shefakaðalin skpar. Nógvar stórar útbyggingar liggja fyri framman, sum Føroya Tele kann gerast partur av.